## Verkfrøðingar burturfluttir

Í Jemen hava ókendir menn burturflutt ein týskan og tveir jemenskar verkfrøðingar, sum arbeiddu fyri eitt gassfelag har suðuri í landinum. Sambært myndugleikunum vórðu teir tríggir menninir burturfluttir í gjár í Shebwa-landspartinum. Tað er ikki óvanligt, at ættarbólkar í Jemen burturflyta útlendingar við tí fyri eyga at fáa loysigjald ella fongslaðar skyldmenn latnar leysar. Í desember vórðu tríggir týskir ríkisborgarar burturfluttir í Jemen og latnir leysir eina viku seinni.



## Bankapartabrøv fullu nógv

Vandin fyri búskaparligari afturgonbgd, og útlitini fyri, at bankarnir fáa brúk fyri nýggjum kapitali, fingu í gjár íleggjarar til at selja síni partabrøv í bankum og øðrum fíggjarfyritøkum. Tað hevði við sær, at í Bretlandi fall partabrævvirðið í bankunum 0,4 prosent, í Týsklandi 1,8 prosent, og á børsinum í Stockholm var fallið 3,9 prosent. Millum bankarnar, sum vóru fyri stórum falli, var tann franski BNP Paribas, hvørs partabrøv fulli heili 13 prosent í virði, skrivar Bloomberg News.

# móti føroyingum




*Hetta er tíðin, tá toskurin kemur til Lofoten at gýta, og hetta er vanliga stórur fiskur. Vártúrurin hjá hesum skipum plagar at roynast sum ein hin besti á árinum. Nú hava norðmenn lagt seg í buktina og hava rikið føroysku flakatrolararnar, sum lógu í rokfiskiskapi, úr norskum sjógvi*

makrelspurninginum.

- Makrelurin hevur broytt ferðingamynstur, og hetta sæst aftur bæði í føroyskum og íslendskum sjógvi, har íslendingar í fjør fiskaðu meira enn 100.000 tons av makreli. Hetta kundu teir gera, tí teir eru ikki partur av avtaluni um makrelin.

Jacob Vestergaard sigur seg væl skilja íslendsku støðuna, men hann ásannar samstundis, at kemur eitt land aftrat við uppí bólkin sum strandaland, er væntandi, at kvotan hjá hvørjum landi sær verður uppaftur minni.

- Nei, tað er ikki undarligt, at íslendingar vilja sleppa upp í part um makrelin, og við seinastu samráðingar millum strandalondini vóru íslendingar við sum eygleiðarar. Væntandi er tí, at Ísland gerst partur av strandalandaavtaluni í næstum.

Um hetta verður næsta ár – ella seinni, veit landsstýrismaðurin ikki at siga.

### Lodna afturfyri

Vit spurdu eisini Jacob Vestergaard, um tað er hugsandi, at Føroyar kunnu fáa nakað av lodnu í Barentshavinum fturfyri at geva meira frá sær av eykakvotuni av makreli, men tað heldur landsstýrismaðurin ikki.

- Nú lodnustovnurin í Barentshavinum byrjar at koma fyri seg aftur, hevur hesin stovnur sjálvsagt eisini áhuga hjá okkum. Men bæði norðmenn og russar hava sagt, at lodnan kemur ikki til umrøðu við samráingarnar um fiskirættindi fyri 2009.

Føroyskir nótaskipareiðarar hava annars róð uppundir, at føroyskir myndugleikar eiga at útvega okkum eini 4.000-6.000 tons av lodnu í Barentshavinum, men hetta verður so ikki í ár.

- Nei, eg haldi ikki, at vit eiga at lata norðmonnum burtur av eykakvotuni av makreli fyri lodnu, sum kanska kann koma uppá tal komandi ár. Makrelur er dýrur fiskur, og tað ræður eisini um hjá okkum – og er okkara skylda - at tryggja okkum ein rímiligan býtispart. Í fyrsta lagi eiga vit okkara rættvísa part av makrelinum, og tað er ógvuliga umráðandi at fáa staðfest henda partin hjá okkum av samlaðu makrelkvotuni. Tástani kunnu vit brúka makrelin í møguligum býti við aðrar tjóðir, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskvinnumálum.

> *»Vit skutu eisini upp at taka spurningin um makrelin upp fyri seg og ikki tengja hann at samráðingunum millum londini annars. Men her vóru norðmenn hvørki at høgga ella stinga í…«*
>
> *(Jacob Vestergaard)*